# JT Electric við nýggjum trolkamera




**TØKNI – Trolkameraið gevur fiskimonnum eitt gott grundarlag til at gera ymiskar skjótar staðfestingar og soleiðis eisini betringar í reiðskapinum. Hetta kann hava stóran týdning fyri veiði og rakstur, sigur Sofus Gregersen, marknaðarleiðari hjá JT Electric á Kambsdali. Fyritøkan er nú farin undir framleiðslu av eini nýggjari útgávu av trolkamera, ið kemur á marknaðin seinni í hesum mánaðinum**

Vilmund Jacobsen

JT Electric á Kambsdali er ein áhugaverd fyritøka, sum arbeiðir við ymiskari tøkni, bæði innan aling, har fyritøkan serliga er kend fyri síni aliljós, sjálvvirkandi fóðurskipanir og trygdarskipanir.

Seinastu árini hevur JT Electric við sínum trolkamera eisini gjørt seg galdandi innan tøkni, sum hevur við trol og trolreiðskap at gera.

Fyri umleið 2-3 árum síðan kom fyritøkan við einum trolkamera, sum ger tað møguligt hjá fiskimonnum við livandi myndum at síggja, hvussu trolreiðskapur virkar í sjónum.

Stórur áhugi hevur verið fyri hesum tóli og hesi tøkni, sum verður marknaðarførd undir enska navninum »trawlcamera«.

JT Electric hevur selt hesa útgerð víða um, og eitt nú eru nøkur kamera seld heilt uppi í Norðuramerika. Onnur eru seld í Írlandi, Noregi og Danmark, umframt at nøkur føroysk skip eisini hava fingið sær hesi kamera.



**STJÓRI**

*Ólavur Thomsen er stjóri í JT Electric. Á telduni stendur heimasíðan www.trawlcamera.com opin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Enn betri

Men tíðin stendur ikki í stað, og tað ger tøknin heldur ikki.

Alla tíðina verður arbeitt við at gera tøknina enn betri, og soleiðis er eisini við trolkameranum hjá JT Electric.

Sofus Gregersen, marknaðarleiðari hjá fyritøkuni á Kambsdali, sigur, at teir nú hava gjørt trolkameraið enn betri, soleiðis at hetta er vorðið eitt hd-kamera við enn betri myndagóðsku, sum eisini hevur uppaftur fleiri møguleikar, enn hitt gamla hevur.

– Framleiðslan av nýggja kameranum er farin í gongd, og fyrstu bíleggingarnar eru komnar í hús. Eg væntí, at fyrstu leveringarnar verða longu seinni í hesum mánaðinum.

Marknaðarleiðarin sigur, at nýggja kameraið er ein víðari menning av tí, sum felagið longu hevur á marknaðinum.

– Við nýggja kameranum fært tú eina betri og størri mynd við hd, og tú fært digtalar myndir. Tøknin við hd og analog er hvør sín, men nýggja kameraið hevur eisini analog-myndir. Við nýggja kameranum kanst tú velja myndagóðskuna, og nýggja útgávan hevur eisini eina betri sjálvstøðuga ljósskipan sum ger, at myndirnar eru betri, sjálvt á djúpari sjógvi.

Spurdur, um tað eru somu keyparar til nýggju útgávuna, sum frammanundan hava útvegað sær hina gomlu, sigur Sofus, at talan er bæði um kenningar og nýggjar áhugaðar keyparar.

– Tað eru fleiri og fleiri, sum síggja møguleikar og fyrimunir í at hava eitt trolkamera, har tú kanst síggja, hvussu trolreiðskapurin arbeiðir í sjónum.

Sofus vísir á, at trolkameraið kann setast hvar sum helst í trolið, og soleiðis ber til at síggja, hvussu reiðskapurin arbeiðir, tá trol og kamera koma aftur at borðið.

– Enn kunnu myndirnar ikki takast beinleiðis upp á brúnna, meðan tóvað verður. Tá trolið kemur at borðið, verður kameraið loyst úr trolinum, og síðan verður ein kaðal settur til, sum førir livandi myndirnar uppí eina teldu. Battaríini í kameranum verða lødd um sama kaðal.

Marknaðarleiðarin sigur, at ein apple-telda er við í pakkanum, og her er forrit, har tú kanst velja myndir av onkrum parti av einum tóvi – ella tú kanst síggja alla gongdina, sum hon er.

### Nógvir fyrimunir

Sofus Gregersen sigur, at allir trolarar kunnu brúka trolkameraið hjá JT Electric.

– Hetta er eitt ógvuliga hent amboð at hava umborð á skipinum. Roynist veiðan ikki, sum hugsandi kundi verið, ber til at síggja, hvussu reiðskapurin arbeiðir í sjónum, og tá ber eisini betri til at staðfesta, hvør trupulleikin er.

Hann vísir á, at trolkameraið soleiðis kann geva fiskimonnum eina størri og neyvari vitan um reiðskapin, og til ber eisini at fara til veitaran av reiðskapinum við livandi myndunum, so møguligir trupulleikar kunnu loysast.

– Kameraið gevur tær eisini eitt grundarlag til at gera ymiskar betringar í reiðskapinum, sum so aftur kann hava stóran týdning fyri veiði og rakstur. Á henda hátt ber til at gera skjótar staðfestingar og soleiðis eisini betringar.

Sofus sigur, at tað er ymiskt, hvussu skipini brúka trolkameraið.

– Summi hava tað í trolinum alla tíðina, og tað ber saktans til, tí tólið er vatntætt. Aðrir hava kameraið í trolinum, tá teir vilja royna at staðfesta okkurt, ið illgruni er um ikki virkar, sum tað skal.

Men eitt er, at trolkameraið kann siga fiskimonnum, hvussu trolið gongur, og hvussu reiðskapurin arbeiðir.

– Í aðrar mátar gevur kameraið tær eisini møguleikan at síggja, hvussu fiskurin uppførir seg, sigur Sofus Gregersen, marknaðarleiðari.

Verkætlanarleiðari við høvuðsábyrgdini fyri trolkameranum og søluni av hesum hjá JT Electric á Kambsdali er Rúni Petersen.

*vilmund@sosialurin.fo*

**... trolkameraið er eitt ógvuliga hent amboð at hava umborð á skipinum. Roynist veiðan ikki, sum hugsandi kundi verið, ber til at síggja, hvussu reiðskapurin arbeiðir í sjónum, og tá ber eisini betri til at staðfesta, hvør trupulleikin er...**

SOFUS GREGERSEN